# 150 *Bjóða tína hjálp*

## (Matteus 9:37, 38)

1. Jehova veit, hvat kennist best,
hvat gleðir teg og gagnar mest.
Tí ríkar hann títt lív hvønn dag
við tænastu av ymsum slag.

(*NIÐURLAG*)

*Bjóðar tú tína hjálp,*
*er tín Gud í nánd.*
*Har stórur tørvur er, fegin vit*
*rætta hjálparhond.*

2. Um landið alt, at ytstu strond,
vit hjálpa til og knýta bond.
Vit geva fús og eru við
í góðum verki lið um lið.
(*Niðurlag*)

3. Í víðu verð vit byggja nýtt
og væla um, tað fevnir vítt.
Vit læra mál og ferðast glað
við gleðiboðum stað úr stað.
(*Niðurlag*)

*snylpnw*-FR Nr. 150 12/15
© 2016 Watch Tower Bible and Tract Society of Pennsylvania

**(Sí eisini Jóh. 4:35; Áps. 2:8; Róm. 10:14.)**